# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Andlát

Gjørt verður kunnugt, at kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara,

**Jens Dam**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 11. sept., 95 ára gamal.
Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Sigrid, Jens Johan, Joan og Pia**

Tey, ið vilja minnast Jens, kunnu lata Sjóndeplinum ein gávu, konta í peningastovnunum.

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra

**Henny Müller**
**fødd Simonsen, ættað úr Norðradali, búsitandi í Havn**

andaðist í heiminum hósmorgunin, 91 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týskvøldið kl. 20.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkuni mikudagin kl. 15.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hans, John og Ebba**

### Fyri 25 árum síðan:

# Mótmælisfólk forðaðu Engell



*Hans Engell verður forðaður av mótmælisfólki*

Tíðindablaðið Sosialurin skrivar 10. september 1985 um eina vitjan hjá danska verjumálaráðharranum Hans Engell, sum førdi til fleiri mótmæli.

Blaðið skrivar tann 5. september, at Hans Engell kom við rutuflogfarinum í gjár. Hann kom til Havnar við danska verjuskipinum og hevði fund við Ríkisumboðið og við landsstýrið, umframt at hann eisini vitjaði í Mjørkadali.

Í sambandi við vitjanina skipaði 14.September-bólkurin fyri mótmælisfundi í Tinganesi. Røðarar vóru Jóanes Nielsen og Árni Dahl. Eisini varð ein yvirlýsing í blaðnum frá Fríu Føroyum, sum átalaði at landsstýrið tók ímóti danska krígsmálaráðharranum, sum hann varð nevndur í yvirlýsingini.

Tá verjumálaráðharrin skuldi hitta landsstýrisfólkini, varð hann forðaður av mótmælisfólki. Fundurin varð tí fluttur til ein annan bygning hjá landsstýrinum.

*Kelda: Tíðindablaðið Sosialurin 10. september 1985*

Min elskede søster
og fine faster

**Edith Ruth Kleberg**

* 24. april 1911

blev hentet hjem af Gud

Rønne,
den 10. september 2010

Hils alle deroppe
Lykke på rejsen

**Birte & Pauline**

## TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og fyri hjálp og umsorgan, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, og abbi

**Arni Kjærbo**

fór heim til Harran.

Vit takka Heimatænastuni fyri tykkara hjálp, Tjarnargarði og Lágargarði fyri tykkara hjálp og umsorgan, ta stuttu tíð hann var hjá tykkum.

Takk til tykkum mongu, sum fylgdi honum, til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
***Sofie, Marin Kristina, Jákup Eyðfinn og Elin við familju***

## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá

**Adolf Rubbeksen**

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Lágargarði, sum hevur tikið sær so væl av honum øll árini, hann búði har. Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og gravarar. Tøkk til øll, sum hjálptu til við ervið, og tøkk øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Sonja, Joan, Lív, Ingi Jan og Bogi***